LØGMANSSKRIVSTOVAN

Prime Minister´s Office

ÁRSFRÁGREIÐING UM EFTIRKANNING

LØGTINGSÁRIÐ 2019

29. juli 2019 – 28. juli 2020

LÓGARTÆNASTAN

Formæli

Við gildi frá løgtingsárinum 2014 skulu øll uppskot frá landsfyrisitingini eftirkannast, áðrenn tey verða løgd fyri Løgtingið ella kunngjørd. Eftirkanningin fer fram eftir ásetingunum í rundskrivi um eftirkanning og rundskrivi um lógarsmíð.

Tað er lógartænastan á Løgmansskrivstovuni sum hevur ábyrgdina av eftirkanningunum. Á lógartænastuni eru fimm starvsfólk, av hesum eru tríggir løgfrøðingar. Arbeiðið er skipað soleiðis, at øll eru við í eftirkanningararbeiðnum. Løgfrøðingarnir hava ábyrgd av tí løgfrøðiligu eftirkanningini, meðan hini bæði starvsfólkini hava ábyrgd av tøkniligu eftirkanningini.

Rundskriv um eftirkanning ásetir, at uppskot til løgtingslóg, ríkislógartilmæli, samtyktar, kunngerð, rundskriv, leiðbeining, bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, og anordningsbekendtgørelse skulu eftirkannast. Tað er ásett, hvat eftirkanningin fevnir um, mannagongdir og tíðarfreistir í samband við innlating av uppskotum og eisini, hvat lógartænastan ikki eftirkannar.

Lógartænastan eftirkannar uppskot tøkniliga og løgfrøðiliga, men ikki málfrøðiliga. Umsitingin í Løgtinginum eftirkannar uppskot eisini málfrøðiliga. Tað er tí ábyrgdin hjá tí einstaka stjórnarráðum at ansa eftir, at uppskot til lógir og kunngerðir eru málsliga lítaleys.

Lógartænastan skal hava minst 5 yrkadagar at eftirkanna eitt uppskot. Hetta eiga stjórnarráðini at hava í huga, tá tey gera tíðarætlan fyri síni uppskot. Í hesum sambandi fara vit á minna á, at uppskotini skulu sendast til eftirkanningar, áðrenn tey verða send til politiskan landsstýrisfund, men aftan á at tey hava verið til ummælis.

Í løgtingsárinum 2019 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 202 uppskot. Lógartænastan eftirkannaði 92% av uppskotunum innan 5 dagar, og 96% av uppskotunum vóru eftirkannaði innan 8 dagar.

Hetta er sætta ársfrágreiðingin, sum verður givin út. Endamálið við útgávuni er framvegis at kunna stjórnarráðini um ymiskt viðvíkjandi lógarsmíði og at siga frá okkara royndum seinasta løgtingárið, og hvussu hetta eftirkanningarárið eftir okkara tykki hevur hepnast.

Eisini er ein partur um ummælistíðir hjá stjórnarráðunum og yvirlit yvir rættarreglur, sum eru kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum.

Løgmansskrivstovan, 12. mars 2021

Nella Festirstein
Deildarstjóri

INNIHALDSYVIRLIT

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin 4
   1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina 4
   1.2. Covid-19 lóggáva. Løgfrøðiligar avbjóðingar 5
   1.3. Covid-19 lóggáva. Fyrireikingararbeiði og broytingar í broytingum 7
   1.4. Nær fer sólseturáseting úr gildi? 8
   1.5. Lóggáva í løgtingslóg á felagsøki (Matstovulógin - epidemilógin) 8
   1.6. Singuler lóggáva? (FAS-líknandi skipan fyri flogvinnu) 9
   1.7. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta 10
   1.8. At senda til ummælis 10
   1.9. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu 10
2. Tøkniliga eftirkanningin 12
   2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina 12
   2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti 12
   2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur 12
   2.4. Skabelónir 13
3. Yvirlit yvir eftirkanningar 14
   3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni 14
   3.2. Yvirlit yvir uppskotini 15
   3.3. Hvat siga tølini? 18
   3.4. Longd á eftirkanning 20
4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum 22
   4.1. Løgmansskrivstovan 22
   4.2. Fíggjarmálaráðið 22
   4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið 23
   4.4. Fiskimálaráðið 23
   4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið 23
   4.6. Almannamálaráðið 23
   4.7. Heilsumálaráðið 23
5. Ummælisportalurin 25
   5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin 25
   5.2. Ummælisfreistir 25
   5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir 27
   5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin 27
6. Kunngerðarblaðið 28
   6.1. Kunngering í tingárinum 2019 28

1. Løgfrøðiliga eftirkanningin

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 3.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Eftirkannað uppskot, ið eru fallin fyri freist Løgtingsins og verða løgd fram aftur, skulu eftirkannast aftur, um tey verða løgd fyri Løgtingið aftur. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 3.2. Lógartænastan eftirkannar øll uppskot til kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini øll uppskot til kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at kunngera kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna. Lógartænastan skal eisini eftirkanna uppskot til bekendtgørelse, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse, sum ríkismyndugleikarnir senda til ummælis hjá stjórnarráðunum.

Vit fara at taka fram nøkur av teimum evnum, ið vit hava sæð í eftirkanningini í hesum tingárinum.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini í stóran mun taka undir við viðmerkingunum, sum tey fáa til eftirkanningina. Um ráðið heldur, at okkurt er ógreitt, ella tey ikki eru samd við metingina hjá lógartænastuni, so samskifta vit við ráðið um hetta, og sum oftast koma vit til eina felags fatan.

Í hesi ársfrágreiðingini taka vit einstøk evni upp, sum hava verið frammi í tingárinum, ella evni sum tað hevur verið spurt um, og slíkt sum vit framhaldandi halda eiga at gerast betur.

1.1. Ásetingar um løgfrøðiligu eftirkanningina

> 7.2. Løgtingslógir: Lógartænastan eftirkannar fyrst og fremst, um løgtingslógaruppskot er í samsvari við grundlóg, heimastýrislóg, stýrisskipanarlóg, tingskipan, tvørgangandi lógir, eitt nú evropeiska mannarættindasáttmálan EMRS, revsilóg, fyrisitingarlóg, løgtingslóg um alment innlit og løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, almennar rættargrundreglur og almenn rættarprinsipp.
>
> 7.3. Harumframt verður serliga hugt at heimildarásetingum til fyrisitingina, afturvirkandi virknað, pantireglum, fyrisitingarligum sektaruppskotum, heimild at áseta gjald, eftirlitsásetingum, afturtøka av løggilding, revsireglum, gildiskomureglum, skiftisreglum, kærureglum o.tíl.
>
> 7.4. Lógartænastan eftirkannar, at løgtingslógaruppskotið er greitt og skilligt fyri bæði løgtingsmenn og borgaran, at sundurbýti í lógargreinar, stykkir, kapitlar, yvirskriftir o.tíl. er hóskandi, og at bæði tær almennu og serligu viðmerkingarnar til uppskotið samsvara við sjálvan lógartekstin.
>
> 7.6. Kunngerðir: Formligu krøvini til kunngerðir eru sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Lógartænastan kannar fyrst og fremst, um neyðug heimild má metast at vera fyri kunngerðini. Hvat viðvíkur innihaldinum í eftirkanningini annars verður víst til brotini um eftirkanning av løgtingslógaruppskotum.

1.2. Covid-19 lóggáva. Løgfrøðiligar avbjóðingar

Tann 12. mars 2020 boðaði løgmaður frá, at Føroyar fóru niður í ferð. Hetta hendi eftir at heimsheilsustovnurin WHO hevði bólkað koronusmittuna sum eina alheimsfarsótt, og støðan í londunum rundanum okkum var álvarsom.

Í tingárinum 2019 vóru í tíðarskeiðnum 18. mars 2020 til 2. juli 2020 samtyktar 20 løgtingslógir orsakað av Covid-19. Harumframt voru 22 kunngerðir givnar út. Løgtingslógirnar og kunngerðirnar hava til felags, at tær seta í gildi serligar reglur í sambandi við støðuna, sum er íkomin av Covid-19.

Slík kreppulóggáva hevur løgfrøðiligar avbjóðingar við sær, við tað at tað má víkjast frá vanligu grundreglunum o.a.

Virknaður aftur i tíð
Allar Covid-19-løgtingslógirnar høvdu vanligu ásetingina um gildiskomu, t.e. at lógin kemur í gildi dagin eftir kunngerð. Tað var fokus á at kunngera løgtingslógirnar so skjótt sum møguligt, og tær eru tí kunngjørdar sama dag, sum tær eru samtyktar. Nakrar av løgingslógunum høvdu eisini *virknað aftur í tíð*, í teimum flestu frá 12. mars. Orsøkin til at 12. mars 2020 var virknaðardagfesting fyri flestu løgtingslógirnar var, at hetta var dagurin, tá landsstýrið boðaði frá, at Føroyar vóru settar niður í ferð og tiltøk vóru sett í verk fyri at avmarka smittuspjaðing.

Í nr. 3.3. í rundskrivi um lógarsmíð er greitt frá, at afturvirkandi virknaður í lógum gongur ímóti grundleggjandi meginreglum í einum rættarsamfelagi – sum er, at ein borgari bara er bundin av galdandi rætti – og tí eiga ásetingar um afturvirkandi virknað bara at verða nýttar í undantaksføri. Tað skal altíð verða grundgivið fyri, hví tað verður mett at vera neyðugt, at ásetingar skulu hava afturvirkandi virknað. Eru ásetingarnar tyngjandi fyri borgaran, krevur hetta enn gjøllari grundgeving. Ásetingar um at áleggja ella hækka revsing kunnu ikki hava afturvirkandi virknað.

Støðan, sum Føroyar komu í vegna Covid-19, er ógvuliga serlig og uttan fordømi í nýggjari tíð. Støðan kom eisini í brádliga, og tí var tað ikki møguligt at fyrireika lóggávu frammanundan, sum kundi taka hædd fyri støðuni, sum landið kom í. At fleiri av løgtingslógunum hava ásetingar um afturvirkandi virknað, er tí væl innanfyri teir vanligu løgfrøðiligu karmarnar.

Viðmerkjast skal, at allar løgtingslógirnar, sum hava ásetingar um afturvirkandi virknað, eru til fyrimuns fyri borgaran. Var í eini kreppustøðu neyðugt at smíða lóggávu, sum hevði virknað aftur í tíð, og sum var tyngjandi fyri borgaran, kundi støðan verið ein onnur.

Sólsetursásetingar
Flestu av samtyktu løgtingslógunum høvdu sokallaða sólsetursáseting. Hetta merkir, at løgtingslógirnar uttan víðari fara úr gildi ein ásettan dag.

Í nr. 3.1.10. í rundskrivi um lógarsmíð verður í útgangsstøðinum mælt frá at nýta sólsetursásetingar í løgtingslógum. Orsøkin er m.a., at ein sólsetursáseting inniber, at lógin fellur burtur ein ávísan dag,

sum kann hava við sær, at tað uppstendur eitt løgfrøðiligt tómrúm, um einki nýtt verður sett í staðin. Slík tómrúm kunnu hava við sær størri trupulleikar, enn at ein lóg sum ikki er tíðarhóskandi el.tíl. framhaldandi er galdandi.

Hóast mælt verður frá at nýta sólsetursásetingar í løgtingslógum, er einki løgfrøðiliga til hindurs fyri at nýta slíkar ásetingar. Serliga í kreppustøðum, sum Føroyar hava verið í seinastu tíðina orsaka av Covid-19, kann tað enntá vera serliga skilagott at nýta sólsetursásetingar. Hetta m.a. tí at tað kann verða brúk fyri víttgangandi átøkum, sum einans skulu verða galdandi í styttri tíðarskeið, at tað er lættari at fáa politiskan meiriluta fyri einum tíðaravmarkaðum uppskoti, og tí at løgtingslógir, sum eru skrivaðar í skundi, og tí møguliga kunnu innihalda feilir og eina óhepna rættarstøðu í longdini, fara úr gildi av sær sjálvum, uttan at politiski myndugleikin aftur skal fyrihalda seg til lógina.

Víðar heimildir til landsstýrismannin at áseta reglur í kunngerð
Vanligi lóggávuhátturin við at landsstýrið leggur uppskot fyri Løgtingið, sum skal viðgera uppskotið tríggjar ferðir og annars fylgja teimum ásetingum, sum eru í tingskipanini um lógararbeiði – umframt mannagongdirnar hjá landsstýrinum frammanundan tingviðgerðini – hevur við sær, at tað kann taka (ov) langa tíð at seta lóggávu í gildi, sjálvt um møguleiki er fyri afturvirkandi virknaði. Samstundis kann hendan mannagongdin tykjast møtimikil í teimum førum, tá ið tað er neyðugt at tillaga lóggávu so hvørt. Tí kann tað umhugsast, um løgtingslógin skal innihalda eina heimild til landsstýrið at áseta nærri reglur í kunngerð.

Tá heimildir til landsstýrið verða umhugsaðar, eigur serliga valdsbýtið at vera tikið við. Stýrisskipanarlógin ásetur, at lóggávuvaldið hjá Løgtinginum og løgmanni í felag. Tó kann landsstýrið ella stovnur undir landsstýrinum í nærri ásettan mun við løgtingslóg fáa heimild til við kunngerð at áseta rættarreglur av almennum slagi. Stýrisskipanarlógin avmarkar sostatt, hvørjar reglur landsstýrið kann fáa heimild at áseta.

Sum greitt frá í nr. 1.4 í rundskrivi um lógarsmíð eru kunngerðir eins og løgtingslógir beinleiðis bindandi fyri bæði borgarar, vinnulív o.o. Meðan løgtingslógir kunna hava ásetingar um alt, sum ikki gongur í móti hægri yvirskipaðari lóg, so sum grundlóg, heimastýrislóg ella stýrisskipanarlóg, so kunnu kunngerðir bert áseta almennar rættarreglur í nærri ásettan mun, sum eru innan fyri heimildina í løgtingslógini.

Hetta merkir, at grundleggjandi reglur eiga ikki at ásetast í kunngerð. Hóast ein heimild í løgtingslóg kann vera heilt víð, so eiga grundleggjandi reglur ikki at ásetast í kunngerð, tí hetta er ikki í tráð við stýrisskipanarlógina. Kunngerðir kunnu sostatt bert nágreina tað, sum longu er ásett í løgtingslógini. Ásetingar um grundleggjandi reglur fyri borgaran, vinnulív o.o. skulu standa í løgtingslógini.

Fleiri av teimum samtyktu kreppulógunum innihalda víðar heimildir til landsstýrismannin. Serliga kunnu løgtingslóg nr. 46 frá 7. apríl 2020 um heimildir at víkja frá skyldum hjá fyritøkum á vinnufelagaøkinum og roknskaparøkinum orsakað av Covid-19 og løgtingslóg nr. 48 frá 7. apríl 2020 um serligar reglur um prógvtøkur orsakað av Covid-19 takast fram. Felags fyri fleiri av heimildunum er, at tær heimila landsstýrismanninum í kunngerð at víkja frá ásetingum í øðrum løgtingslógum.

Slíkar ásetingar, sum geva landsstýrismanninum heimild at víkja frá øðrum løgtingslógum, eru vítt-gangandi og eiga tí at verða nýttar við varsemi, soleiðis at tað kann verða tryggjað, at galdandi lóggáva altíð er innanfyri teir karmar – og tað valdsbýti – sum stýrisskipanin setur.

At tað er Løgtingið, sum samtykkir tær heimildir, sum landsstýrinum verða givnar, er sjálvsagt við til at tryggja, at landsstýrið ikki fær ov víðar heimildir. Tað kann tó í ávísum førum vera torført at meta um, hvussu ein heimild fer at verða nýtt, og hvussu hon fer at verða tulkað, serliga tá ið tað, tá lógin verður samtykt, ikki er greiða á t.d. júst hvørjum ásetingum landsstýrið vil víkja frá.

1.3. Covid-19 lóggáva. Fyrireikingararbeiði og broytingar í broytingum

Løgmaður boðaði á grækarismessu, hósdagin 12. mars 2020, frá, at Føroyar skuldu niður í ferð fyri at tálma spjaðingini av Covid-19. Seks dagar seinni – mikudagin 18. mars 2020 – var hjálparpakki I viðgjørdur í løgtinginum. Talan var um fýra broytingarlógir. Av tí, at álvarsama støðan við Covid-19 kom í rættuliga brádliga, er eingin ivi um, at lógarfyrireikandi arbeiði við løgtingslógunum, sum vórðu samtyktar 18. mars 2020, var sera stutt. Stundir hava t.d. ikki verið til at senda uppskotini á vanligan hátt til *ummælis*.

Løgtingið viðgjørdi fyrst í apríl 2020 hjálparpakka II. Her vóru fimm nýggjar høvuðslógir og tríggjar broytingarlógir samtyktar. Tvær av broytingarlógunum og ein høvuðslóg (løgtingslógirnar nr. 42, 43 og 44 frá 7. apríl 2020), sum vóru við í hjálparpakka II, innihildu tillagingar av broytingum, sum vóru gjørdar í sambandi við hjálparpakka I.

Í juni 2020 varð hjálparpakki III samtyktur. Talan var um fimm nýggjar høvuðslógir. Eisini vóru tríggjar broytingarlógir, sum eins og tað var galdandi við hjálparpakka II, innihildu tillagingar av broytingum, sum fyrr vóru gjørdar í sambandi við hjálparpakka I og II.

Tað ber illa til at draga endaligar niðurstøður grundað á hetta, tó at hetta er ein ábending um, at tá ið lógararbeiðið skal ganga so skjótt, og tá ið vikið verður frá teimum mannagongdum, sum vanliga eru í sambandi við lógarsmíð, undir hesum ummæli og vanligu tíðarfreistirnar í Løgtinginum – eru størri sannlíkindi fyri, at okkurt verður gloymt, og at feilir verða gjørdir. Hetta hevur við sær, at nýggj lóggáva er neyðug, og at øll lóggávugongdin skal ganga av nýggjum.

Hóast tað í hesi serligu undantaksstøðu hevur gingið so skjótt, at onkur feilur av misgáum er íkomin, vísa tær royndir, sum eru gjørdar hesa tíðina, at tað er møguligt hjá landsstýri og Løgtingi at bera skjótt at og at seta heilt nýggjar serskipanir í gongd innan sera stutta tíð. Hetta er – hóast onkran feilin – at frøast um.

1.4. Nær fer sólseturáseting úr gildi?

Covit-19 hevur havt við sær, at fleiri lógir hava sólsetursáseting. Um ein skipan skal virka t.d. frá 1. februar til 31. mars er vanliga orðingin, at løgtingslógin fer úr gildi 31. mars.

Onkur hevur í hesum sambandi spurt lógartænastuna, nær lógir fara úr gildi? Er tað við byrjan av samdøgrinum ella við endan av samdøgrinum? Tvs. í døminum frammanfyri er lógin tá galdandi fyri 31. mars ella ikki? Tað er ongin ivi um, at lógir koma í gildi við byrjan av samdøgrinum. Men nær fara tær úr gildi? Ein vanliga fatan er, at tað má vera við endan av ásetta samdøgrinum – tvs. at 31. mars er íroknaður - meðan onnur halda, at tað má vera eins og við gildiskomu av lógum við byrjan av samdøgrinum - tvs. 31. mars er ikki íroknaður.

Lógartænastan hevur fingið at vita frá Civilstyrelsen, at í Danmark fara lógir úr gildi við byrjan av samdøgrinum. Fyri at hava greiðar reglur hesum viðvíkjandi hevur lógartænastan mælt til, at sólsetursásetingar framyvir verða orðaðar soleiðis, at lógin verður roknað at fara úr gildi við byrjan av samdøgrinum. Tvs. at lógir koma í gildi og roknast at fara úr gildi við byrjan av samdøgrinum. Um ein skipan skal virka t.d. frá 1. februar til 31. mars skal orðingin framyvir vera, at løgtingslógin fer úr gildi 1. apríl.

Lógartænastan metir ikki, at nýggja orðingin eigur at ávirka úrgildiskomuna á teimum lógum, sum longu eru samtyktar av Løgtinginum. Ongin ivi er um, at í øllum teimum løgtingslógunum, sum Løgtingið hevur samtykt, hevur ætlanin hjá tinginum verið, at dagurin, sum lógin er sett at fara úr gildi, skal vera íroknaður. Men hetta er tó ein spurningur, sum tað eru dómstólarnir, sum endaliga avgera.

Nýggja orðingin er ein nágreining, sum skal brúkast framyvir, og sum eisini samsvarar við siðvenjuna í Danmark.

1.5. Lóggáva við løgtingslóg á felagsøki (Matstovulógin - epidemilógin)

Í hesum tingárinum samtykti Løgtingið eina broyting í Matstovulógini, hvørs endamál var at geva landsstýrismanninum heimild at avmarka upp- og afturlatingartíðir á matstovum o.tíl. fyri at forða fyri smittuspjaðing.

Í eftirkanningini viðmerkti lógartænastan, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er felags málsøkið, og at reglur um hetta er ásett í epidemilógini. Endamálið við epidemilógini er at forða fyri smittuspjaðing í Føroyum av ávísum sjúkum, undir hesum Covid-19. Lóggávuvaldið á málsøkinum er hjá ríkismyndugleikunum.

Lógartænastan vísti á, at tað er ivasamt, um tað ber til í eini løgtingslóg at hava ásetingar, sum beinleiðis hava til endamáls at forða fyri smittuspjaðing, soleiðis sum lagt var upp til, av tí at málsøkið er

felagsmál. Harumframt varð viðmerkt, at tað var ivasamt um matstovulógin, hvørs endamál yvirskipað er at skipa matstovuvirksemi o.s.fr. í Føroyum, og sum ikki hevur heilsulig ella onnur endamál, var rættað stað at hava eina áseting um at forða fyri smittuspjaðing.

Í juni 2020 boðaði Sundheds- og Ældreministeriet bæði landsstýrinum og Løgtinginum frá, at tey vóru samt við lógartænastuni um, at málsøkið at forða fyri smittuspjaðing er felags málsøkið. Av somu orsøkt metti Sundheds- og Ældreministeriet, at Løgtingið ikki hevði neyðuga málsræði at áseta reglur í Matstovulógini, hvørs endamál er at forða smittuspjaðing. Eisini varð sagt at ríkismyndugleikarnir vóru til reiðar at viðgera tillagingar í epidemilógini fyri Føroyar, um føroyskir myndugleikar ynsktu tað.

Løgtingsins umsiting setti eisini spurnartekin við, um Løgtingið hevði lóggavuvaldið viðvíkjandi ætlaðu lógarbroytingini. Tey hildu, at talan var um lóggávu, sum átti at regulerast í epidemilógini og ikki í matstovulógini, men mæltu tó ikki til burturvísing av málinum.

Í álitunum frá Vinnunevndin sæst greitt, at eisini tingfólk vóru sera ørkymla av, at tað var ivasamt, um Løgtingið hevði neyðuga lóggávuvaldið viðvíkjandi ætlaðu broytingin.

Lógartænastan heldur, at eitt er at vit lóggeva við løgtingslóg í førum, tá ið tað er ógreitt ella ivasamt, um talan er um lóggávu á yvirtiknum málsøki ella á felagsmálsøki, og har føroyskir og danskir myndugleikar møguliga heldur ikki eru heilt samdir um tulkingina av markamótinum. Men tað eigur ikki at koma fyri í einum rættarsamfelagi, at vit lóggeva á felagsøki, tá ið tað er greitt, at føroyskir myndugleikar ikki hava lóggávuvaldið á økinum.

1.6. Singuler lóggáva? (FAS-líknandi skipan fyri flogvinnu)

Í einum lógaruppskoti var ætlanin at gera eina FAS-líknandi skipan fyri flogfeløg. Lógarbroytingin skuldi heimilað afturbering til flogfeløg av teirri løn, herundir eftirløn, frítíðarløn, samsýning o.ø., ið eitt felag, sum hevur fulla skattskyldu til Føroya og sum er skrásett í serligari skrá hjá TAKS rindar persónum, skattskyldugum í Føroyum fyri arbeiði umborð á flogførum og tyrlum sum flogskiparar, stýrimenn og flogternur.

Hóast ásetingin var orðað generelt, so metti lógartænastan at í hesum føri kundi talan vera um singulera lóggávu, av tí at tað einans er eitt føroyskt flogfelag, sum leyk treytirnar fyri afturbering.

Vísast skal á, at meginreglan um valdbýtislæruna í § 1 í stýrisskipanarlógini hevur við sær, at tað eftir umstøðunum eigur at verða víst stórt afturhaldni við at lóggeva um viðurskifti hjá einstøkum likamligum ella løgfrøðiligum persónum. Ein singuler lóggáva kann vera orsøk til týðandi meginregluligan iva og kann eisini lætt bera brá av tilvild hjá lóggávuvaldinum. Monopolstøða kann tó ikki hava við sær, at tað ikki kann lóggevast, tó at tað eigur at vera gjørt við varsemi.

1.7. Vanligar málsviðgerðarreglur, innlitsreglur og reglur um persóndáta

Tað kemur javnan fyri, at tað í lógaruppskoti verða ásettar serligir málsviðgerðarreglur ella skotið verður upp at skerja innlitsreglurnar sbrt. innlitslógini. Lógartænastan ger vart við, at reglurnar sambært fyrisitingarlóg, innlitslóg og dátuverndarlóg eiga at vera nøktandi í nærum øllum førum. Um tað í einstøkum føri ikki er so, má stjórnarráðið grundgeva fyri, hví er neyðugt at víkja frá vanligu reglunum og vísa á, hví vanligu reglurnar ikki eru nøktandi.

1.8. At senda til ummælis

Tað er ógvuliga týdningarmikið, at øll uppskot verða send til ummælis. Hetta so at borgarar, vinnulív, almennir myndugleikar, stovnar o.o. fáa høvi at gera viðmerkingar og siga sína hugsan um uppskotið. Eisini er tað vanliga so, at tey, sum kenna økið best, sum lóggivið verður um, eru teir borgarar, vinnulív o.o., sum lóggávan hevur til endamáls at ávirka.

Tað hevur eisini verið spurgt, um tað er neyðugt at senda uppskot til ummælis, tá ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Lógartænanstan vísti á, at tað er ongantíð verri fyri eitt uppskot, at tað verður sent til ummælis, hóast ongin ivi er um, at broytingin skal fremjast. Tað kann vera við til at upplýsa lógaruppskotið betri og eisini avleiðingarnar av tí.

1.9. Ásetingar um eftirkanning av ríkislóggávu

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

7.7. Ríkislógartilmæli: Formligu krøvini til ríkislógartilmæli eru sambært § 45 í tingskipanini tey somu sum til løgtingslógaruppskot sambært § 37, og sum ásett í rundskrivi um lógarsmíð. Eftirkanningin fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um løgtingslógaruppskot, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama. Hetta er grundað á, at ríkislógartilmæli grundleggjandi víkja frá løgtingslógaruppskotum, tí talan er um lógartekst, sum longu er galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.

7.8. Bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelse: Sambært stýrisskipanarlógini § 48 er tað avvarðandi landsstýrismaður, sum ummælir uppskot til kunngerðir, sum ráðharri sendir landsstýrinum við atliti at seta í gildi fyri Føroyar. Eftirkanningin av hesum fer í høvuðsheitum fram eftir sama leisti, sum tá talan er um uppskot til kunngerðir, tó at hon ikki kann sigast at vera tann sama, tí talan er ofta um kunngerðir, sum longu eru galdandi í Danmark, og at uppskotini í flestu førum verða gjørd av ríkismyndugleikunum.

7.9. Við eftirkanningini sambært nr. 7.7. og 7.8. verður serliga hugt eftir, um tað í inngangínum verður víst til lóg ella kunngerð, sum er sett í gildi fyri Føroyar, og hvørjar tillagingar eru gjørdar til føroysk viðurskifti.

Ríkislóggáva er t.d. serstakar fólkatingslógir fyri Føroyar og kongligar fyriskipanir umframt danskar kunngerðir. Hesi uppskot skulu eisini sendast lógartænastuni til eftirkanningar. Donsk lógaruppskot og fyriskipanaruppskot senda stjórnarráðini sum oftast til eftirkanningar, tá ið uppskotið er klárt at senda til landsstýrisfund, soleiðis sum ásett er í rundskrivinum um eftirkanning.

Tá talan er um størri lógaruppskot mælir lógartænastan til, at danska lógaruppskotið ella fyriskipanaruppskotið verður sent lógartænastuni til undaneftirkanning, áðrenn tað verður sent til ummælis. Hetta soleiðis at møguligar tøkniligar villur og tilvísingar til føroyska lóggávu kunnu verða rættaðar av ríkismyndugleikunum, áðrenn uppskotið verður sent út til ummælis.

Danskar kunngerðir (bekendtgørelser) skulu eisini sendast til eftirkanning. Hetta tykjast øll stjórnarráðini ikki at geva sær nóg nógv fær um, tí tað kemur meira enn so fyri, at lógartænastan fyrstu ferð sær danskar kunngerðir, tá tær verða sendar til kunngering í Kunngerðarblaðnum.

Vit fara enn einanferð at heita á stjórnarráðini um at minnast til at senda bekendtgørelser, lovbekendtgørelse, anordningsbekendtgørelser til eftirkanning, tá tey fáa uppskotini til ummælis frá ríkismyndugleikunum.

2. Tøkniliga eftirkanningin

2.1. Ásetingar um tøkniligu eftirkanningina

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 6.1. Tøkniliga eftirkanningin verður gjørd eftir ásetingunum í rundskrivi um lógarsmíð og skal tryggja, at uppskotið uttan trupulleikar ella ivamál kann kunngerast í Kunngerðablaðnum og samanskrivast í logir.fo.
>
> 6.2. Er avvarðandi stjórnarráð og lógartænastan ikki á einum máli um onkra viðmerking, skal stjórnarráðið venda sær til lógartænastuna hesum viðvíkjandi.
>
> 6.3. Uppskot til rundskriv og leiðbeiningar verða einans tøkniliga eftirkannað. Tó so, um okkurt eyðsýnt ivamál er, so verður hetta nevnt.

Lógartænastan eftirkannar uppskot í mun til galdandi rundskriv um lógarsmíð, sum kom í gildi 1. januar 2018.

Viðvíkjandi tí tøkniliga partinum av eftirkanningini er tað framvegis soleiðis, at onkur av stjórnarráðunum ikki geva sær nóg nógv far um, at tað er tað eftirkannaða uppskotið (skjalið), sum skal sendast til Løgtingið ella til kunngering.

2.2. Tá broytt verður í einum eftirkannaðum uppskoti

Tað kemur eisini fyri, at stjórnarráðini broyta uppskotið, eftir at tað hevur verið til eftirkanningar, t.d. strika ella seta nýggjar ásetingar inn. Tá hava vit eisini seinni sæð, at broytingin ikki er sett rætt upp tøkniliga. Vit mæla til, at um broytingar verða gjørdar í uppskotinum aftan á eftirkanningina, at stjórnarráðini senda uppskotið til nýggja endureftirkanning. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.3. Uppskot sum er burturfallið í tinginum og verður sett fram aftur

Uppskot, sum er burturfallið í Løgtinginum, t.d. tí tingsetan endaði, áðrenn uppskotið var liðugt viðgjørt, og sum landsstýrið aftur ætlar at leggja fyri Løgtingið, skal sendast til eftirkanning eins og onnur uppskot, hóast uppskotið hevur verið eftirkannað í eini fyrru tingsetu. Tað vísir seg oftani, at smærri broytingar eru gjørdar, og at tøkniligar villur sníkja seg inn aftur í uppskotið. Hesi uppskot kann lógartænastan ofta avgreiða skjótt, um stjórnarráðið upplýsir, hvørjar broytingar tey hava gjørt.

2.4. Skabelónir

Lógartænastan hevur gjørt 8 skabelónir til: løgtingslóg, løgtingslóg um broyting í løgtingslóg, javntekst, kunngerð, kunngerð um broyting í kunngerð, ríkislógartilmæli, rundskriv og leiðbeiningar.

Nýggjasta útgávan er altíð at finna á breddanum hjá lógartænastuni á heimasíðuni hjá Løgmansskrivstovuni: http://www.lms.fo/fo/arbeidsoki/logarsmid/word-skabelonir-til-logarsmid/

Øll sum gera uppskot til løgtingslógir, kunngerðir, rundskriv og leiðbeiningar o.a. eiga at brúka skabelónirnar, tí hetta ger, at uppskotini verða tøkniliga rætt sett upp.

3. Yvirlit yvir eftirkanningar

3.1. Uppskot, ið skulu eftirkannast av lógartænastuni

Rundskriv um eftirkanning ásetir:

> 2.1. Lógartænastan á Løgmansskrivstovuni eftirkannar øll lógaruppskot, uppskot til ríkislógartilmæli og uppskot til samtyktar, ið landsfyrisitingin tilevnar, áðrenn hesi verða løgd fyri Løgtingið. Frávik frá hesum kann einans gerast í samráð við løgmann.
>
> 2.2. Lógartænastan eftirkannar allar kunngerðir, ið landsfyrisitingin tilevnar. Eisini allar kunngerðir, ið almennir stovnar, sum hava lógarheimild at lýsa kunngerðir í Kunngerðablaðnum, tilevna.

Í løgtingsárinum 2019 eftirkannaði lógartænastan tilsamans 202 uppskot frá øllum sjey stjórnarráðunum. Hetta er 64 uppskot færri enn í 2018, men er á leið á sama støði sum í 2015. Felags fyri 2015 og 2018 er, at eitt nýtt landsstýrið tók við hesi ár. Eitt nývalt landsstýrið ger vanliga ta fyrstu tíðina ikki so nógv lógaruppskot.

Nøgdin av uppskotum sigur tó ikki alt, tí uppskotini kunnu vera sera ymisk bæði í longd, torleika og margfeldið. Soleiðis var eisini í hesum tingárinum.

Talva 1	**Eftirkanningar íalt**					
	2014	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**
Løgtingslóg	**19**	**11**	**14**	**23**	**29**	**26**
Kunngerð	**69**	**74**	**97**	**88**	**93**	**76**
Broytingarlóg	**75**	**64**	**50**	**46**	**72**	**48**
Broytingarkunngerð	**35**	**36**	**50**	**65**	**54**	**39**
Ríkislógartilmæli	**27**	**3**	**11**	**12**	**6**	**6**
Uppskot til samtyktar	**3**	**1**	**-**	**1**	**2**	**3**
Stovnar				**5**	**1**	**-**
Rundskriv				**6**	**8**	**2**
Leiðbeining				**2**	**-**	**2**
Fráboðan frá løgmanni	**1**	**2**	**-**	**-**	**1**	**-**
Kirkjulig fyriskipan						**1**
Íalt	**229**	**191**	**222**	**248**	**266**	**202**

3.2. Yvirlit yvir uppskotini

Niðanfyri er yvirlit yvir uppskotini frá teimum einstøku stjórnarráðunum. Tølini eru fyri løgtingsárini 2014 - 2019.

Talva 2	**Løgmansskrivstovan**					
	2014*	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**
Løgtingslóg	**-**	**-**	**1**	**-**	**-**	**-**
Kunngerð	**-**	**3**	**12**	**-**	**2**	**-**
Broytingarlóg	**2**	**-**	**4**	**1**	**5**	**2**
Broytingarkunngerð	**-**	**-**	**3**	**-**	**-**	**-**
Ríkislógartilmæli	**-**	**1**	**3**	**-**	**1**	**3**
Uppskot til samtyktar	**3**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Rundskriv	**-**	**-**	**-**	**-**	**1**	**-**
Kirkjulig fyriskipan	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**	**1**
Fráboðan frá løgmanni	**1**	**2**	**-**	**-**	**1**	**-**
Ískt	**6**	**6**	**23**	**1**	**10**	**6**

*Uttanríkistænastan partur av LMS

Talva 3	**Fíggjarmálaráðið**					
	2014	**2015**	**2016**	**2017**	**2018**	**2019**
Løgtingslóg	**5**	**3**	**2**	**3**	**4**	**5**
Kunngerð	**8**	**10**	**3**	**7**	**-**	**12**
Broytingarlóg	**16**	**24**	**10**	**14**	**21**	**17**
Broytingarkunngerð	**1**	**1**	**8**	**5**	**2**	**5**
Ríkislógartilmæli	**19**	**-**	**3**	**11**	**3**	**-**
Uppskot til samtyktar	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**	**-**
Rundskriv				**6**	**4**	**2**
Leiðbeining				**1**	**-**	**-**
Ískt	**49**	**38**	**26**	**47**	**34**	**41**

Talva 4	Umhvørvis- og vinnumálaráðið					
	2014*	2015**	2016**	2017**	2018**	2019
Løgtingslóg	2	1	4	7	3	10
Kunngerð	11	9	17	26	12	21
Broytingarlóg	19	6	7	5	7	9
Broytingarkunngerð	6	3	6	7	6	9
Ríkislógartilmæli	6	1	1	-	1	2
Uppskot til samtyktar	-	1	-	1	2	-
Rundskriv				-	2	-
Stovnar				5	1	-
Íalt	44	21	35	51	34	51

* Vinnumálaráðið **Uttanríkis- og vinnumálaráðið

Talva 5	Fiskimálaráðið					
	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Løgtingslóg	4	2	3	4	1	1
Kunngerð	29	28	29	33	31	34
Broytingarlóg	6	8	4	3	6	3
Broytingarkunngerð	14	12	18	21	24	11
Ríkislógartilmæli	-	-	1	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-	-
Leiðbeining				1	-	1
Íalt	53	50	55	62	62	50

Talva 6	Uttanríkis- og mentamálaráðið					
	2014*	2015*	2016*	2017*	2018*	2019
Løgtingslóg	6	1	2	1	5	4
Kunngerð	7	9	4	6	22	5
Broytingarlóg	10	9	6	7	4	2
Broytingarkunngerð	3	8	3	6	10	3
Ríkislógartilmæli	-	--	-	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-	3
Rundskriv				-	1	-
Íalt	26	27	15	20	42	17

* Mentamálaráðið

Talva 7	Almannamálaráðið					
	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Løgtingslóg	-	2	1	5	4	4
Kunngerð	1	4	14	1	4	1
Broytingarlóg	15	8	9	9	16	12
Broytingarkunngerð	2	4	2	1	5	5
Ríkislógartilmæli	-	-	-	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-	-
Leiðbeining	-	-	-	-	-	1
Íalt	18	18	26	16	29	23

Talva 8	Heilsumálaráðið					
	2014	2015*	2016*	2017*	2018*	2019
Løgtingslóg	2	1	1	2	5	2
Kunngerð	9	9	10	10	18	3
Broytingarlóg	7	6	7	5	7	3
Broytingarkunngerð	9	7	6	18	3	6
Ríkislógartilmæli	2	1	3	1	1	1
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-	-	-
Íalt	29	24	27	36	34	15

***** Heilsu- og innlendismálaráðið

Talva 9	Samferðslumálaráðið*			
	2015	2016	2017	2018
Løgtingslóg	1	-	1	5
Kunngerð	-	3	5	4
Broytingarlóg	3	3	2	6
Broytingarkunngerð	1	4	7	4
Ríkislógartilmæli	-	-	-	-
Uppskot til samtyktar	-	-	-	-
Íalt	5	10	15	19

*****Samferðslumálaráðið varð stovnað í 2015 og niðurlagt í 2019

Talva 10	Stovnar undir landsstýrinum*					
	2014	2015	2016	2017	2018	2019
Kunngerð	**4**	**2**	**5**	**1**	**-**	**-**
Broytingarkunngerð	**-**	**-**	**-**	**4**	**1**	**-**
Ialt	**4**	**2**	**5**	**5**	**1**	**-**

*Sjóvinnustýrið og Fjarskiftiseftirlitið

3.3. Hvat siga tølini?

Mynd 1



Verður hugt eftir býtinum av teimum 202 uppskotunum millum løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógartilmæli og uppskotum til samtyktar í tingárinum 2019 í mun til í 2018, so sæst at tað eru nakað færri løgtingslógir, broytingarlógir og broytingarkunngerðir útgivnar í tingárinum 2019 í mun til í 2018.

Flestu uppskotini høvdu Umhvørvis- og vinnumálaráðið og Fiskimálaráðið, síðani kemur Fíggjarmálaráðið, meðan hini uppskotini eru býtt millum hini stjórnarráðini. Løgmansskrivstovan hevði fægst uppskot.

Av teimum 202 uppskotunum vóru 26 nýggjar løgtingslógir í mun til 29 í 2018. Ein nýggj løgtingslóg merkir, at tað verður lóggivið um nakað, sum tað ikki fyrr er lóggivið um, ella at lóggávan á økinum verður endurnýggja og umskipað soleiðis, at tað ikki er nøktandi at gera broytingar í eini galdandi løgtingslóg. Av teimum 26 lógaruppskotunum átti Umhvørvis- og vinnumálaráðið 10, Fíggjarmálaráðið 5, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Almannamálaráðið 4 hvør, Heilsumálaráðið 2 og Fiskimálaráðið 1 av uppskotunum.

Tað vóru 48 uppskot um at gera broytingar í galdandi løgtingslógum. Hetta er ein stór minking í mun til 2018, tá tað vóru 72 uppskot til broytingarlógir. Av hesum átti Fíggjarmálaráðið 17, Almannamálaráðið 12, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 9, Fiskimálaráðið og Heilsumálaráðið 3 hvør, meðan Løgmansskrivstovan og Uttanríkis- og mentamálaráðið áttu 2 hvør.

Tølini vísa eisini, at Fiskimálaráðið, Uttanríkis- og mentamálaráðið og Heilsumálaráðið høvdu væl færri uppskot, meðan Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði væl fleiri uppskot í tingárinum 2019 enn í 2018. Verður hugt nærri at hesum tølum sæst, at tað serliga er tal av lógaruppskotum ella tal av kunngerðum, sum er grundin til, at stjórnarráðini antin høvdu fleiri uppskot ella færri uppskot í 2019 enn í 2018.

Av samlaðu eftirkannaðu uppskotunum átti Umhvørvis- og vinnumálaráðið 51, Fiskimálaráðið 50, Fíggjarmálaráðið 41, Almannamálaráðið 23, Uttanríkis- og mentamálaráðið 17, Heilsumálaráðið 15, og Løgmansskrivstovan 6.

Mynd 2



Tað sæst týðuliga, at tað serliga eru kunngerðirnar, sum tað eru flest av í eftirkanningini. Av teimum 202 uppskotunum vóru 115 kunngerðir, av hesum 76 nýggjar kunngerðir og 39 broytingarkunngerðir. Tvs. at 57% av eftirkanningunum í tingárinum 2019 vóru kunngerðir.

Hinvegin vóru 74 lógaruppskot, av hesum 26 nýggjar lógir og 48 broytingarlógir; hetta svarar til 37% av eftirkannaðu uppskotunum. Ríkislógartilmælini vóru 6 í tali svarandi til 3%. Seinastu 3% eru uppskot til samtyktar, rundskriv og leiðbeiningar.

3.4. Longd á eftirkanning

Rundskrivið um eftirkanning ásetir:

> 3.2. Lógartænastan skal hava í minsta lagi 5 yrkadagar til eftirkanning. Í serligum førum, tá arbeiðsbyrðan hjá lógartænastuni kann væntast at vera stór, t.d. undan seinasta framløgudegi, kann roknast við, at eftirkanning tekur longri enn 5 yrkadagar. Hetta eigur landsfyrisitingin at hava í huga.

Í løgtingsárinum 2019 blivu 92% av uppskotunum eftirkannað innan 5 dagar, ið er minst ásetta tíðin, sum lógartænastan skal hava til at eftirkanna uppskot. Hetta er ein framgongd á uml. 3% í mun til løgtingsárið 2018, og er tað besta úrslitið fyri øll 6 árini, har eftirkanningar eru skrásettar.

96% av uppskotunum í 2019 vóru eftirkannað innan 8 yrkadagar. Hetta er tað sama sum í 2018. Hini 4% av uppskotunum vóru eftirkannað millum 9 og dagar. Øll átrokandi uppskot hava verið eftirkannað innan ásettu tíðina, meðan tað hava verið uppskot, sum ikki hava havt skund, sum hava bíðað.

Talva 11	**Longd á eftirkanning**											
	2014		**2015**		**2016**		**2017**		**2018**		**2019**	
	Nøgd	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**
1-5 dagar	178	77,7	171	89,5	170	76,6	206	83	234	89	185	92
6-8 dagar	32	14,0	5	2,6	20	9,0	22	9	20	7	9	4
9 dagar ella longri	19	8,3	15	7,9	32	14,4	20	8	11	4	8	4
Íalt	**229**	**100,0**	**191**	**100,0**	**222**	**100,0**	**248**	**100**	**265**	**100**	**202**	**100**

Mynd 3


Longd av eftirkanning 2019
9 dagar ella longri
4%
6-8 dagar
4%
1-5 dagar
92%
1-5 dagar
6-8 dagar
9 dagar ella longri

Mynd 4


Longd á eftirkanning 2014-2019
250
200
150
100
50
0
1-5 dagar
6-8 dagar
9 dagar ella longri
2014
2015
2016
2017
2018
2019

4. Eftirkannað uppskot og viðgerðin í Løgtinginum

Tað sæst á tølunum, at tað vóru eftirkannað tilsamans 83 uppskot hjá øllum stjórnarráðunum tilsamans. Av hesum vóru 80 lógaruppskot, av hesum 26 høvuðslógir, 48 broytingarlógir 6 ríkislógartilmæli. Eisini vóru 3 uppskot til samtyktar eftirkannaði.

Landsstýrið legði 78 uppskot fyri Løgtingið. Av hesum vóru 74 lógaruppskot og 4 uppskot til samtyktar. Løgtingið samtykti 65 lógaruppskot og 2 uppskot til samtyktar, og eitt uppskot fall burtur. Landsstýrið valdi at taka 10 uppskot aftur, orsakað av skerdu umstøðunum hjá Løgtinginum av covid-19 smittuni.

Mynd 5



4.1. Løgmansskrivstovan

Hjá Løgmansskrivstovuni vóru 5 lógaruppskot eftirkannað. Av hesum vóru 3 ríkislógartilmæli og tvær broytingarlógir. Øll 5 uppskotini vóru løgd fyri Løgtingið, sum samtykti øll uppskotini.

4.2. Fíggjarmálaráðið

Tað vóru eftirkannað 22 lógaruppskot hjá Fíggjarmálaráðnum. Av hesum vóru 5 høvuðslógir og 17 broytingarlógir. Fíggjarmálaráðið legði 27 uppskot fyri Løgtingið; tað merkir, at nøkur uppskot ikki vóru eftirkannað av lógartænastini, áðrenn tey vóru løgd fyri Løgtingið. Av framløgdu uppskotunum vóru 22 uppskot samtykt, meðan 1 uppskot fall burtur, tá tingsetan endaði. 4 uppskot vóru tikin aftur, orsakað av skerdu umstøðunum hjá Løgtinginum av covid-19 smittuni.

4.3. Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 21 lógaruppskot hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Av hesum vóru 10 høvuðslógir, 9 broytingarlógir og 2 ríkislógartilmæli. Landsstýrismaðurin legði 12 uppskot fyri Løgtingið. Tað merkir at 9 av eftirkannaðu uppskotunum ikki vóru løgd fyri Løgtingið. Løgtingið samtykti 10 av uppskotunum, meðan 2 uppskot vóru tikin aftur, orsakað av skerdu umstøðunum hjá Løgtinginum av covid-19 smittuni.

4.4. Fiskimálaráðið

Tað vóru eftirkannað 4 lógaruppskot hjá Fiskimálaráðnum. Av hesum var 1 høvuðslóg og 3 broytingarlógir. Øll uppskotini vóru løgd fyri Løgtingið og samtykt.

4.5. Uttanríkis- og mentamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 9 uppskot hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir, 2 broytingarlógir og 3 uppskot til samtyktar. Tað vóru løgd 9 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 7 av uppskotunum, meðan 2 uppskot vóru tikin aftur, orsakað av skerdu umstøðunum hjá Løgtinginum av covid-19 smittuni.

4.6. Almannamálaráðið

Tað vóru eftirkannað 16 lógaruppskot hjá Almannamálaráðnum. Av hesum vóru 4 høvuðslógir og 12 broytingarlógir. Tað vóru løgd 15 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti øll uppskotini.

4.7. Heilsumálaráðið

Tað vóru eftirkannað 6 lógaruppskot hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum. Av hesum vóru 2 høvuðslógir, 3 broytingarlógir og eitt ríkislógartilmæli. Tað vóru løgd 4 uppskot fyri Løgtingið, sum samtykti 3 uppskot, meðan eitt uppskot varð tikin aftur, orsakað av skerdu umstøðunum hjá Løgtinginum av covid-19 smittuni.

Mynd 6


Úrslitið í Løgtinginum í 2017, 2018 og 2019
100
90
80
70
60
50
40
30
20
10
0
2017
2018
2019
Framlagt
Samtykt
Burturfallið
Tikið aftur

5. Ummælisportalurin

Uppskot eiga altíð at verða send til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, og vanliga eigur tíðarfreistin at lata inn ummæli at vera 4 vikur. Henda freist eigur ikki at verða skerd uttan so, at tað er átrokandi neyðugt.

Eftir áheitan frá MEGD verður mælt til, at stjórnarráðini í størst møguligan mun eisini senda uppskot til ummælis hja MEGD.

Uppskot til verklagslógir eiga altíð at verða sendar til ummælis hjá Fíggjarmálaráðnum.

Umframt at stjórnarráðini senda uppskot til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum, skulu øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini leggjast á ummælisportalin, sum er á heimasíðuni hjá landsstýrinum, og sum øll hava atgongd til.

Ummælisportalurin sæst her: http://www.foroyalandsstyri.fo/fo/kunning/uppskot-til-ummaelis/

Á heimasíðuni hjá stjórnarráðunum ber eisini til einans at síggja tey uppskot, sum tað ráðið hevur til ummælis.

Okkara royndir eru, at stjórnarráðini nú eru meira tilvitað um at leggja fyrireikingararbeiðið við lógaruppskotum soleiðis til rættis, at tað í tíðarætlanini eisini verður sett tíð til, at uppskot kunnu verða send til ummælis, sum høvuðsregla í 4 vikur.

Enn er tað tó soleiðis, at orsakað av tíðarneyð verður ummælistíðin ofta skerd, heilt niður í nakrar dagar, og í hesum førunum verða uppskotini ofta heldur ikki løgd á almenna ummælisportalin. Hetta hevur við sær, at dygdin á lógaruppskotinum ikki gerst so góð, sum hon kundi verðið.

5.1. Einans uppskot sum eru løgd á ummælisportalin

Grundarlagið fyri hesum partinum av ársfrágreiðingini er ein uppteljing av teimum uppskotum, sum hava verið løgd út alment til ummælis á ummælisportalurin, sum er á heimasíðuni hjá landsstýrinum. Tað merkir, at uppskot, sum als ikki hava verið send til ummælis, ella sum einans hava verið send beinleiðis til ummælis hjá viðkomandi uttanhýsis pørtum, ikki eru við í hesi uppteljing. Yvirlitið vísir sostatt einans ummælisfreistir fyri tey uppskot, sum hava verið á ummælisportalinum.

5.2. Ummælisfreistir

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2019 løgdu stjórnarráðini tilsamans 59 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Av hesum vóru 29 løgtingslógaruppskot, 28 kunngerðir, 1 ríkislógartilmæli og 1 uppskot til samtyktar. Stytsta ummælisfreistin var 1 dagur og longsta var 81 dagar.

Talva 12	**Ummælisfreistir**					
	2017		**2018**		**2019**	
	Nøgd	**%**	**Nøgd**	**%**	**Nøgd**	**%**
1 - 14 dagar	22	29	34	33	17	29
15 - 27 dagar	38	49	33	33	27	46
28 dagar ella longri	17	22	35	34	15	25
Íalt	**77**	**100**	**102**	**100**	**59**	**100**

Sum høvuðsregla eiga uppskot at verða send til ummælis í 4 vikur ella 28 dagar. Tað sæst á talvuni omanfyri, at fyri 44 ella 75% av uppskotunum var ummælisfreistin í løgtingsárinum 2019 sett millum 1-27 dagar, og fyri 15 ella 25% av uppskotunum var ummælisfreistin 28 dagar ella meira. Tað merkir, at tað er ein fjórðingur av øllum uppskotunum, sum hava havt tilmæltu ummælistíðina upp á 4 vikur. Hetta er ikki nøktandi.

Ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, verður als ikki mett at vera nøktandi. Ein ummælisfreist upp á í minsta lagi 15 dagar má roknast sum eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist. Á talvuni omanfyri sæst at fyri 17 ella 29% av uppskotunum var ummælisfreistin sett millum 1-14 dagar, og fyri 42 ella 71% av uppskotunum var ummælisfreistin meira enn 15 dagar.

Tað merkir, at knappur triðingur av øllum uppskotunum ikki hava havt eina nøktandi ummælisfreist. Tað eru alt ov nógv uppskot eftir okkara tykki.

Mynd 7



Myndin vísir, at tað eru færri uppskot í 2019, sum hava verið til ummælis longri enn 28 dagar, enn í 2018. Tó sæst at tað eru fleiri uppskot í 2019, sum hava verið til ummælis í minst 15 dagar, og eitt sindur færri uppskot, sum hava verið til ummælis í minni enn 14 dagar.

5.3. Samanumtøka um ummælisfreistir

Øll stjórnarráðini uttan Løgmansskrivstovan hava sent uppskot til ummælis við styttri freist enn 14 dagar. Tilsamans vóru 29% av uppskotunum hjá øllum stjórnarráðunum undir einum send til ummælis við styttri enn 14 daga freist, og sum nevnt frammanfyri er *ein ummælisfreist, sum er minni enn 14 dagar, ikki nøktandi*.

Fyri Fiskimálaráðið var talan um 80% av teirra uppskotum, fyri Heilsumálaráðið 55 %, Fíggjarmálaráðið 35%, Almannamálaráðið 20%, meðan talan var um 10% av uppskotunum hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, og síðani 8% av uppskotunum Umhvørvis- og vinnimálaráðnum.

Tað er hinvegin jaligt, at 75% ella 3/4 av uppskotunum hóast alt hava verið send til ummælis við meira enn 15 daga freist, sum má metast at vera eitt *minstamark* fyri eini rímiligari ummælisfreist.

Tá talan er um at senda uppskot til ummælis við *tilmæltu ummælisfreistini uppá 4 vikur*, var fyri Løgmansskrivstovuna talan um 100% av teirra uppskotum, fyri Almannamálaráðið 60%, Uttanríkis- og mentamálaráðið 30%, Heilsumálaráðið 22%, Umhvørvis- og vinnumálaráðið 15%, og síðani 14% av uppskotunum hjá Fíggjarmálaráðnum, meðan Fiskimálaráðið skilur seg út við, at onki av teirra uppskotum hava havt minst 4 vikurs ummælisfreist.

5.4. Ov nógv uppskot verða ikki løgd á ummælisportalin

Á ummælisportalinum sæst, at í tingárinum 2019 løgdu stjórnarráðini tilsamans 59 uppskot alment til ummælis á ummælisportalinum. Í mun til hetta so eftirkannaði lógartænastan 202 uppskot, ið øll áttu at verið løgd út til almenna hoyring á ummælisportalinum.

Tað ber ikki til beinleiðis at samanlíkna hesi tølini, tí uppskot kunnu verða send til ummælis í eini tingsetu, men tey verða ikki eftirkannað og løgd fyri Løgtingið fyrrenn í næstu tingsetu.

Hóast hesa óvissu tykist tað at vera ein rættuliga stórur munur á eftirkannaðum uppskotum og uppskotum løgd á ummælisportalin, tá munurin er uppá 143 uppskot. Hetta merkir at 70% av uppskotunum ikki vóru løgd á ummælisportalin.

Ein orsøk til hetta kann vera, at tað sær út til, at lóggávan viðvíkjandi covid-19 ikki sær út til at hava verið send alment til ummælis.

Vit fara at heita á stjórnarráðini um at minnast til, at øll uppskot hjá stjórnarráðunum eisini skulu leggjast á ummælisportalin, umframt at stjórnarráðini senda uppskot beinleiðis til ummælis hjá øllum viðkomandi pørtum.

6. Kunngerðarblaðið

Í løgtingslóg nr. 109 frá 17. desember 1987 um alment kunngerðablað, sum broytt við løgtingslóg nr. 131 frá 14. desember 2012, verður álagt landsstýrinum at stíla fyri útgávu av einum almennum kunngerðablaði: Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir yvirhøvur, ið landsstýrið gevur út, kunngerast.

Frá 1. januar 2013 verður Kunngerðablaðið einans givið út talgilt og ikki í pappírsútgávu sum áður. Kunngerðaportalurin gerst við hesum einasti bindandi kunngerðamiðilin til løgtingslógir, kunngerðir o.a.

Í Kunngerðablaðið A verða løgtingslógir og kunngerðir, givnar av landsstýrinum, kunngjørdar, og í Kunngerðablaðið B verða lógir og kunngerðir, ið ríkismyndugleikarnir geva út, kunngjørdar.

Tað er lógartænastan, sum hevur ábyrgd fyri at geva út Kunngerðarblaðið. Kunngerðablaðið verður vanliga givið út fríggjadagar.

6.1. Kunngering í tingárinum 2019

Í tingárinum 2019 vóru tilsamans 206 løgtingslógir, kunngerðir, ríkislógir og bekendtgørelser o.a. kunngjørd í Kunngerðarblaðnum. Av hesum vóru 166 føroyskar rættarreglur og 34 ríkislóggáva. Harafturat eru 5 fráboðanir og 1 kirkjulig fyriskipan. Tvs. at 80% av kunngjørdu rættarreglunum í tingárinum 2019 eru føroyskar, meðan 20% er donsk ríkislóggáva.

Talva 21	**Kunngerðir**	**Løgtings-lógir**	**Fyriskipan (Anordning)**	**Bekendt-gørelse**	**Fíggjar-lóg o.a.**	**Fráboðan løgmans**
Almannamálaráðið	5	9	-	-	-	-
Fiskimálaráðið	44	2	-	-	-	-
Fíggjarmálaráðið	13	13	-	-	10	-
Heilsumálaráðið	8	3	-	8	-	-
Løgmansskrivstovan	1	2	2	13	-	5
Uttanríkis- og mentamálaráðið	4	5	2	3	-	-
Umhvørvis- og vinnumálaráðið	22	11	-	6	-	-
Ialt	**97**	**59**	**4**	**30**	**10**	**5**

Mynd 10



Mynd 11